# Ítrótturin um vikuskiftið

**Leygardagin:**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| FLOGBÓLTUR | TB – SÍ | Trongisvágur | Klokkan 14.00 | Menn |
| HONDBÓLTUR | VB – VÍF | Vágur | Klokkan 15.00 | Kvinnur |
| FLOGBÓLTUR | Dráttur – Fleyr | Giljanes | Klokkan 15.00 | Kvinnur |
| FLOGBÓLTUR | KÍF – TB | Kollafjørður | Klokkan 15.00 | Kvinnur |
| HONDBÓLTUR | Neistin – StíF | Tórshavn | Klokkan 17.00 | Kvinnur |
| HONDBÓLTUR | H71 Kyndil | Hoyvík | Klokkan 18.15 | Menn |

**Sunnudagin:**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| FLOGBÓLTUR | Mjølnir – ÍF | Klaksvík | Klokkan 14.00 | Kvinnur |
| HONDBÓLTUR | Tjaldur – Kyndil | Runavík | Klokkan 15.00 | Kvinnur |
| HONDBÓLTUR | Neistin – StíF | Tórshavn | Klokkan 16.00 | Menn |
| HONDBÓLTUR | KÍF – VÍF | Kollafjørður | Klokkan 16.00 | Menn |
| FLOGBÓLTUR | Mjølnir – ÍF | Klaksvík | Klokkan 16.00 | Menn |

## Sunset Deildin *Kvinnur*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNIN MÁL | TAPT MÁL | MUNUR | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Stjørnan | 11 | 335 | 256 | 79 | 20 |
| 2 | Tjaldur | 10 | 278 | 220 | 58 | 15 |
| 3 | Neistin | 10 | 274 | 242 | 32 | 15 |
| 4 | Kyndil | 10 | 247 | 228 | 19 | 10 |
| 5 | VB | 10 | 243 | 265 | -22 | 7 |
| 6 | VÍF | 11 | 258 | 315 | -57 | 4 |
| 7 | StÍF | 10 | 194 | 303 | -109 | 1 |

## Atlantic Airways Deildin *Menn*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNIN MÁL | TAPT MÁL | MUNUR | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Neistin | 10 | 351 | 264 | 87 | 19 |
| 2 | KÍF | 10 | 286 | 252 | 34 | 15 |
| 3 | VÍF | 11 | 301 | 276 | 25 | 10 |
| 4 | Kyndil | 9 | 236 | 224 | 12 | 10 |
| 5 | H71 | 10 | 270 | 272 | -2 | 10 |
| 6 | StÍF | 9 | 221 | 218 | 3 | 6 |
| 7 | Team Klaksvík | 11 | 238 | 397 | -159 | 0 |

## Eik-ligan *kvinnur*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNIÐ | TAPT | VUNNIN SETT | TAPT SETT | MUNUR | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | SÍ | 9 | 8 | 1 | 24 | 10 | 14 | 16 |
| 2 | Mjølnir | 8 | 6 | 2 | 21 | 7 | 14 | 12 |
| 3 | Fleyr | 8 | 6 | 2 | 20 | 10 | 10 | 12 |
| 4 | TB | 8 | 5 | 3 | 18 | 14 | 4 | 10 |
| 5 | ÍF | 8 | 4 | 4 | 14 | 14 | 0 | 8 |
| 6 | KÍF | 8 | 2 | 6 | 8 | 21 | -13 | 4 |
| 7 | Dráttur | 8 | 1 | 7 | 11 | 22 | -11 | 2 |
| 8 | Ternan | 9 | 1 | 8 | 7 | 25 | -18 | 2 |

## Eik-ligan *menn*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNIÐ | TAPT | VUNNIN SETT | TAPT SETT | MUNUR | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | ÍF | 9 | 8 | 1 | 24 | 5 | 19 | 16 |
| 2 | SÍ | 9 | 7 | 2 | 23 | 7 | 16 | 14 |
| 3 | Mjølnir | 8 | 4 | 4 | 13 | 13 | 0 | 8 |
| 4 | Fleyr | 9 | 3 | 6 | 11 | 20 | -9 | 6 |
| 5 | TB | 9 | 0 | 9 | 1 | 27 | -26 | 0 |

# Fótbóltsfeløgini farin í arbeiðshandskarnar

**FÓTBÓLTUR** Tað var lítið og einki nýtt at frætta frá fótbóltsfeløgunum fyrstu vikurnar aftaná, at kappingin var liðug. Seinastu vikuna hevur verið øðrvísi

Uni Holm Johannesen

B36 hevur helst verið felagið, sum hevur gjørt minst um seg í vetur. Í øllum førum, tá evnið er tilgongd av leikararum.

Árstalsfelagið hevur mist níggju spælarar síðan summarsteðgin í ár.

Onkur hevur tikið skemtandi til, at tað var ivasamt, um felagið fór at manna lið í bestu deildini næsta ár.

So galið verður tað helst ikki.

Jákup á Borg, Símun Joensen, Róaldur Jacobsen og Heini í Skorini hava boðað frá í vikuni, at teir spæla eisini við B36 í 2011.

### NSÍ væl fyri

Tað varð greitt mikudagin, at Jann Ingi Petersen spælir ikki við NSÍ.

Føroyski landsliðsleikarin fer nú at royna seg í danska Skive, sum er í næstbestu deildini.

Felagið úr Runavík boðar nú frá, at Jústines R. Hansen og Jonhard Frederiksberg, sum vóru millum stuðulsleikararnar í ár, halda fram við Løkin.

### Kalsø verður verandi

Steffan Kalsø var toppskjútti hjá KÍ, sum spældi í næstbestu deildini í ár.

Framherjin spælir eisini í Klaksvík næsta ár.

Stefan Kalsø skeyt 16 mál og átti sín leiklut í uppflytingini hjá KÍ.

Gunnar á Steig, Sørmund Kalsø og Jógvan Isaksen halda eisini fram.

### Levi aftur í sundalagnum

EB/Streymur er eisini so smátt farið undir fyrireikingarnar til kappingarárið 2011.

Felagið boðaði frá á sínari heimasíðu í vikuni, at Levi Hanssen fer aftur at venja og spæla við Margáir.

Hann umboðaði HB í hesum kappingarárinum.

Alex José dos Santos hevur eisini longt sína avtalu við felagið.

# Tórður royndarvant í Íslandi

**FÓTBÓLTUR** Tórður Thomsen hevur vant við BÍ/Bolungarvík á Vestfirðum í Íslandi

Heri Simonsen

Stóra íslendska blaðið »Vísir« veit at siga á netsíðu sínari, at Tórður Thomsen var og royndarvandi við BÍ/Bolungarvík á Vestfirðum farna vikuskiftið.

Tórður Thomsen vardi málið hjá BÍ/Bólungarvík í einum venjingardysti ímóti Leiknir. Dysturin endaði við javnleiki 1-1. Guðjón Þórðarson, sum er venjari hjá BÍ/Bolungarvik sigur, at hann var væl nøgdur avrikið hjá Tórði Thomsen.

Guðjón Þórðarson og Tórður Thomsen kennast frá tí, at Tórður Thomsen á sinni royndarvandi við enska liðnum Crewe Alexandra, tá Guðjón Þórðarson var venjari har.

Guðjón Þórðarson sigur við Vísir, at nærri verður at frætta frá málinum í nærmastu framtíð.

Fyri stuttum skrivaði Tórður Thomsen annars undir sáttmála við B68, so óivað eru nakrir leikir at telva uppá pláss, um Tórður Thomsen skal til Vestfirðir at verja málið hjá BÍ/Bolungavik.

*heris@sosialurin.fo*

# Magnus og Birita eru bestu kortini

**SVIMJING**

**Leygardagin og sunnudagin fara níggju føroyskir svimjarar at taka lut á Norðurlendsku Junior Meistarastevnuni í Kastrup í Danmark**

Uni Holm Johannesen

Svimjisambandið boðar frá, at tað eru bara einstakir møguleikar at vinna heiðursmerki í ár.

Svimjararnir eru í stóran mun tey, sum eiga føroyskt juniormet í ymiskum greinum, umframt nøkur einstøk seniormet.

Støðið á norðurlendsku juniormeitarastevnuni er sera høgt, og væntandi fara sviar og danir at kappast um flestu heiðursmerkini.

Svimjisambandið sigur, at Magnus Jákupsson, Havnar Svimjifelag, og Birita Debes, FLOT, eru bestu føroysku kortini, umframt møguligu liðsvimjingarnar hjá gentum.

Birita Debes, FLOT, Cecilia Eysturdal, Ægir, Erna Katrin Olsen, SuSvim, Heðin L. Osen, Ægir, Jonna B. Thomsen, FS, Magnus Jákupsson, HS, Poula Ø. Mohr, FS, Sofus Bech, SuSvim, og Turið S. Christiansen, Ægir, eru í føroyska hópinum.